e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

# Ikki talan um verjuloysi

*Formaðurin í B36, Kristian á Neystabø, er bjartskygdur, hóast felagið hevur upplivað stóra frágongd í verjupartinum*



*Kristian á Neystabø ber ongan ótta fyri verjuparti felagsins*

JÁKUP MØRK

Tá tað fyri stuttum fréttist, at Djóni Joensen hevði skift frá B36 til NSÍ, vórðu helst mong av teirri fatan, at nú fór at standa illa til í verjupartinum hjá B36 komandi kappingárið.

Frammanundan hevur felagið mist fleiri leikarar, sum hava roynst væl í verjupartinum.Her verður serliga hugsað um Arnbjørn Danielsen, Ninoslav Milenkovic, umframt at tað tykist ivasamt, um Pól Thorsteinsson verður at síggja á B36 liðnum komandi ár. Leggja vit afturat, at liðskiparin Jens Kristian Hansen roynist væl í Skotlandi, har talan kann gerast um eina varuga avtalu við Ayr United, kann tykjast sum um, at allur verjuparturin á liðnum er fokin. Mong viðhaldsfólk høvdu helst vónað, at Djóni fór at teljast millum teirra, sum komu at manna nýggju verjuna, men nú verður hann so heldur ikki við.

**Eingin vandi**

Kristian á Neystabø sigur við Sosialin, at leiðslan í felagnum sjálvandi harmast um, at leikarar skifta til onur feløg, men hann leggur afturat, at um teir mettu hetta vera ein trupulleika, so varð eisini nakað gjørt fyri at loysa henda.

Formaðurin heldur hinvegin, at verður hugt at verjuni seinastu tvey kappingarárini, so var talan tá um ein nógv størri trupulleika.

Tá hevði felagið ongar verjuleikarar, so av neyð vórðu Jens Kristian og Pól, sum báðir vóru framrættaðir miðvallarar, fluttir oman í verjuna.

Sum kunnugt eydnaðist hetta stak væl, og teir báðir myndaðu eisini landsliðsverjuni, har Arnbjørn Danielsen, sum var fluttur úr álopinum, eisini var inni í myndini.

**Heldur ein fyrimunur**

Kristian heldur sostatt ikki, at talan er um nakra neyð, hvat viðvíkur verjuleikarum, og leggur hann afturat, at við tí spælihátt-inum, sum fremsta lið felagsins hevur ognað sær seinnu árini, er alneyðugt, at teir leikarar, sum manna verjuna, hava góðan bóltførleika, og at tað tískil heldur er at rokna sum ein fyrimunur, tá miðvallarar verða fluttir oman í verjuna.

Júst hvørjar leikarar talan verður um, er ikki greitt enn, men er hetta ein spurningur, sum nýggi venjarin skal taka støðu til, tá hesin kemur til landið um mánaðarskiftið.

# Geva føroyingum ans

*Tað er ikki bara her heima, at lagt verður til merkis, at føroyingar fara aðrastaðni at royna fótbóltseydnuna*

JÁKUP MØRK

Fyri stuttum skrivaðu vit, at teir báðir, John Heri Dam og Rúni í Soylu, vóru farnir til Jotun at royna seg undir leiðslu av Kára Reynheim.

Sum kunnugt er talan um lið í trið norsku bestu deildini, og hóast stóru norsku fjølmiðlarnir kanska ikki vísa hesum so stóran ans, so hevur lokala blaðið í Øvre Årdal, Årdal og Lærdal Avis, fingið fatur á tíðindunum.

Fyri stuttum hevði blaðið sostatt eina grein um teir báðar føroyingarnir, sum nú skulu royna at styrkja um liðið. Í greinini verður greitt frá, hvaðani teir báðir koma, og á hvørjum plássum teir eru vanir at leika.

Til stuttleika kann nevnast, at norðmenninir helst ikki hava lært leikararnar rættuliga at kenna, tí í greinini verður skrivað, at John Heri vanliga hevur verið í høgra miðvallarborðið, meðan Rúni hevur leikt sum bæði vinstri bakkur og áleypari.

Annars leggur blaðið stóran dent á, at teir báðir til samans hava 16 ára royndir í bestu føroysku deildini, og vóna teir sjálvandi, at hetta kann betra um møguleikarnar hjá heldur óroynda norska liðnum.

**Strævin venjing**

Sum skilst, so hevur venjingin har yviri verið sera strævin, ikki minst orsakað av, at liðfelagar teirra vóru í heilt góðari venjing, longu tá báðir føroyingarnir komu yvir.

Leikararnir har yviri hava so at siga ongan steðg havt í venjingini, og tá teir báðir hava tikið sær av løttum, síðani landskappingin her heima endaði, skal helst eitt sindur av renning til, áðrenn teir verða í eins góðari venjingarstøðu.

Hóast heldur hørðu byrjanina, so lata teir báðir væl at umstøðunum. Í løtuni starvast teir á verksmiðju nærhendis, so teir hava eisini annað enn sjálvan fótbóltin at takast við.

Ætlandi skulu teir báðir venja við norska felagnum í einar tveir mánaðar, áðrenn støða verður tikin til, um uppihaldið skal leingjast, so teir eisini vera við, tá landskappingin fer í gongd.



Onsdag 12. januar 2000 Årdal

Runi og Jon prøver lukka i Jotun

ØVRE ÅRDAL: Runi Söylo (27) og Jon Heri Dam (24) har til saman 16 år med erfaring frå toppserien på Færøyane. No vil dei to prøve seg i Jotun-drakta.

Toffare

Gratis

# Toppdystur í Klaksvík

*Í kvøld verður toppdystur í Klaksvík, tá Stjørnan er vertur fyri VÍF*



*Seinast VÍF var í Klaksvík, vunnu tær heldur óvæntað á Stjørnuni, so heimaliðið eigur hevnd til góðar*

JÁKUP MØRK

Upprunaliga skuldi dysturin verið leiktur 16. januar, men tá Stjørnan skuldi leika dyst í steypakappingini sama dag, varð dysturin ístaðin ásettur at vera í dag.

Talan er um tey bæði ovastu liðini á stigatalvuni, og tá liðini bæði hava 11 stig hvør, kann VÍF koppa Stjørnuna av ovastu rók, um so er tær megna at endurtaka sigurin frá grundspælinum.

Tá varð VÍF einasta liðið, sum megnaði at vinna á Stjørnuni, so leikararnir vita av, uppgávan ikki er ógmøgulig, hóast hon kann tykjast nakað møtumikil.

Hóast liðini undan dystinum hava sama stigatal, so hevur Stjørnan tveir dystir til góðar, so hóast tær skuldu tapt, kunnu tær fravegis avgera alt einsamallar. Lítið er tó at ivast í, at Klaksvíksgenturnar longu nú ætla sær at sleppa leysar á stigatalvuni og harvið staðfesta oddastøðuna.

# Peningur og gjald fyri ávíst avbera gott ítróttaravrik

Henda hugsanin hevur tó ongantíð verið skrúvað saman at verða nakað, fremstu inan økið dagliga tosað um. Kanska er orsøkin, at tað rætt og slætt ikki er til at hava yvirlit yvir. Ella hvør skal døma avrikið at verða út um øll onnur og tískil vert einum ávísum gjaldi.

Eitt av fremstu tíðarritunum í Bretlandi hevur tó havt hetta á tungu í farnu viku. Í grein og samrøðu við navnframa Ryan Giggs hevur hesin verið sera bersøgin og sagt at tað vildi ikki verið meira enn rímulig, at eitt hvørt gjald varð sett á avrikið. Málið ahnn setti inn móti Arsenal í FA-cup kappingini seinasta ár, hevur førkað seg sum ein gummibóltur runt heimin á øllum teimum ymsu sjónvarpsrásunum, og í fleiri førum er hetta nýtt sum reklama.

Blaðið tekur tó ikki dagar ímillum, um hetta er rímuligt. Tó verður tónleika ídnaðurin nevndur, har bólkar og einstaklingar fáa pening, hvørja ferð eitt av løgum teirra er at hoyra.

Ein kann spyrja, um hetta ikki er ov umfatandi og tískil ógjørligt at fáa innført innan ítróttina. Líka so væl sum eitt av góðu avrikunum, so hava eisini tápulig og øgilig mistøk ferð eftir ferð verið tikin fram á skýggjan, og ein kann spyrja, um hesi eisini skuldu borið við sær eitt ávíst gjald. Ella sum blaðið sjálvt tekur fram, fótbóltshendingin sum oftast var at síggja í Bretlandi í farna ári. Tað var tá navnframi Paolo di Canio sendi dómaran í vøllin. Skal hesin sami hava pening fyri hetta avrikið, ella hvussu við einum Tyson við hálvum oyra hangandi úr munninum o.s.fr.

Hugsanin er tó sera áhugaverd.

RÓGVI PETERSEN



## út at koyra

# Mazda Premacy - ein kappingarførur MPV-bilur



*Nýggjastur í MPV-flokkinum er Premacy frá Mazda. Bilurin, sum er bygdur á 323 undirvognin, kom til landið fyrr í mánaðinum*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

mazda

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 1,8 ccm. |
| | 4 cyl. 16V 100 hk |
| 0-100 km/t | 11.8 sek. |
| Trekk: | Framman |
| Dekk: | LX 185/65-14 |
| | GLX 195/55-15 |
| Bremsur: | Skivur framman og aftan |
| Stødd og vekt | |
| Longd: | 429,5 cm, |
| Breidd: | 170,5 cm, |
| Hædd: | 157,0 cm, |
| Vekt: | 1410 kg. |
| | …og lastar 350 kg |
| Bensinnýtsla: | 10,4 km/l |
| Prísur LX: | kr. 175.700,- |
| Prísur GLX: | kr. 187.700,- |
| Søluumboð: | Berg Motors |
| | Staravegur |
| | FO-110 Tórshavn |

MAGNUS GUNNARSSON

Á føroysku vegunum síggja vit, at MPV bilarnir av álvara eru farnir at gera vart við seg.

MPV stendur fyri Multi Purpose Vehicle, so her er talan um praktiskar bilar, ið eru gjørdir til fleiri endamál. Renault Espace var helst ein av teimum fyrstu í Europa, meðan tær flestu amerikansku bilverksmiðjurnar hava gjørt hesar bilarnar í fleiri ár.

**Ein nýggjur Mazda MPV**

Ein nýggjur, sera spennandi, MPV bilur kom til landið í januarmánaði. Talan er um Mazda Premacy. Her kemur Mazda í beinleiðis kapping við eitt nú Renault Scenic. Premacy er bygdur yvir Mazda 323 undirvognin, so her skuldi ikki verið nakar ivi um, at bilurin er slitsterkur og álítandi.

Premacy varð fyrstu ferð sýndur fram á Geneve bilframsýningini. Bilurin hevur 5 setur, 2 framman og 3 aftan, har tey 3 baksterini kunnu leggjast saman ella takast úr bilinum uppá fá sekund.

Hvørt setur vigar einans 12 kg og kann takast í hondina sum ein vanligur beriposi.

**Bilurin innan**

Innan er Premacy sum flestu MPV bilar, eitt hav av skuffum og hillum at leggja ting frá sær á.

Undir setrunum, undir dúrkinum, og har tú minst væntar tað. Bilurin er rúmligur, við góðum plássi til beinini og uppeftir, soleiðis at 5 fólk sita væl, og uttan at tey á nakran hátt eru til ampa fyri hvønn annan. Eisini hevur bilurin eitt pollenfiltur, sum er 10 ferðir størri ávirkan enn vanlig pollenfiltur.

Filtrið kann eisini taka deym, ið kemur uttanífrá, burtur.

**Bilurin fæst í tveimum útgávum**

Premacy er lættur at handfara, sum ein persónbilur at koyra og rúmligur sum ein mini-bussur.

Mazda er við til at gera tað til eina fragd at koyra hesar MPV-bilarnar.

Stýringin og undurvognurin virka føst og kontant, og hevur tað við sær, at bilurin merkist næstan ”sportligur” at koyra.

Hetta er serliga galdandi fyri GLX útgávuna við 15” felgum og 195/55-15 dekkum.

Bilurin fæst í tveimum útgávum. LX útgávan hevur servostýring, sentrallás, elsíðuspegl við hita, el-rútar framman og TCS (Antispin). GXL útgávan hevur afturat hesum veloursetur, armlen millum forsetrini elrútar aftan, tokulyktir framman, hita í setrunum, fjarstýrt sentrallás og klimaanlegg. Báðar útgávurnar hava somu motorstødd, 4 cyl. 16 ventilar og 100 hk. Pollenfiltur, Airbag (eisini í síðunum), ABS bremsur og TCS (Antispin) er standard.

Alt í alt ein sera spennandi bilur, ið helst fer at klára seg væl í kappingini við aðrar MPV-bilar.



*Innan er Premacy sum flestu MPV bilar: Eitt hav av skuffum og hillum at leggja ting frá sær á — undir setrunum, undir dúrkinum o. s. fr...*

**Mynd: Jens Kristian Vang**



*Premacy er lættur at handfara, sum ein persónbilur at koyra og rúmligur sum ein mini-bussur. Mazda er við til at gera tað til eina fragd at koyra hesar MPV-bilarnar*

**Mynd: Jens Kristian Vang**